FRÓÐSKAPARSETUR · FØROYA

# LEYS STØRV

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya eru tvey parttíðar (20%) granskingar- og undirvísingarstørv í løgfrøði leys at søkja.

Størvini verða sett sum fyribils avloysarastørv í eitt kalendaraár í senn. Tey settu skulu virka innan løgfrøðiliga gransking og útbúgving á deildini.

**Starvsøki**
Granskingarparturin verður samskipaður við verandi gransking deildarinnar og serøki umsøkjarans. Starvið ber í sær gransking, undirvísing og fyrisiting.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu minst hava kandidat- ella masterútbúgving í løgfrøði ella samsvarandi. Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava granskað í føroyskum viðurskiftum.

Innanhýsis metingarnevnd verður sett at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum.

Starvið verður lønt sambært yrkisfelagssáttmála.

**Umsókn**
Umsóknarfreistin er 1. mai 2010.

Størvini verða sett 1. juli 2010 ella skjótast til ber. Størvini ganga út 31. desember 2010, men kunnu endurnýggjast eitt kalendaraár í senn.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til fyrisitingarstjóran, Rúnu Hjelm, ella til rektaran, Jóan Paula Joensen.

Upplýsingar um virksemið á Fróðskaparsetrinum eru at finna á heimasíðuni: www.setur.fo.

Umsóknir saman við avriti av próvskjølum, CV, skrá yvir granskingarvirksemi, skrivligum og prentaðum vísindaritum skulu sendast Fróðskaparsetrinum.

**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

# Barnsburðar avloysari!

Søkt verður eftir fólki at arbeiða 3 til 4 dagar um vikuna. Tíðarskeiðið er frá 1 juni 2010 og eitt ár fram.

Um tú ert smílandi, álítandi, tímir væl at arbeiða við barnaútgerð og hevur royndir innan handil, so skriva eina umsókn til okkum.

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 1. mai 2010.

**Umsóknin skal sendast til :**
Vøggan, Heykavegur 3, Boks 1417, 110 Tórshavn

VØGGAN

tel. 319088 - www.voggan.fo

Sosialurin 341800



# Sethús í Vági til sølu

**Sethús við Bøðgøtu 39 í Vági bygd í 1964 til sølu um hóskandi boð fæst**

**Ringjast kann á tel. 373112 - 590995 - 374250**

# Rætting

Av misgáum er lýsingin sum var í Dimmalætting 9. apríl og í Sosialinum 31. mars komin út við einum feili.

Ælabogahald kemur 1. mai 2010 at kostað kr. 329,- og ikki 319,- sum stóð í lýsingini

**Vit biðja um umbering**

Sosialurin

TELEVARPIÐ

# Aðalfundur

Aðalfundur verður mánadagin 30. apríl kl. 19.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

»Avslutningur« verður aftaná við ábiti.

Tilmelding á tel. 216656

**Klaksvíkar Billiardfelag**

Lesið Sosialin - so eru tit við



Bláí Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

## VÆLKOMIN TIL landsstevnu hjá Bláa Krossi 16. og 18. apríl 2010 í Bygdarhúsinum á Strondum

Evni: Hvar er bróður tín?
Diakoni í meinigheitini

**Fríggjadagur 16. apríl:**

**18.00 Håbets fest:**
"Håbets fest" er barnatiltak fyri børn frá 1. til 7. flokk.

**21.00 Sangløta**
Luttakarar á sangløtuni:
- Miriam og Victor Carlsen
- The Gadders
- Lisa Frederiksberg
- Vitin
- Effata

**Leygardagur 17. apríl:**

**10.00 Koma - drekkamuður og andakt**

**10.30 Menniskjaáskoðan og diakoniáskoðan Bláa Kross Føroya**
Framløga og orðaskifti v/Hjalmar Hansen, aðalskrivara.

**12.00 Døgurði** (neyðugt við tekning)

**14.00 Aðalfundur**
Skrá sambært viðtøkunum

**16.00 Drekkamuður**

**16.30 Diakoni í meinigheitini:**
Oðraskifti um diakoni í meinigheitini.
Hvat og hvussu er diakoni í eini meinigheit?
Upplegg frá: Tummas Jacobsen, samkomuleiðari, Uni Næs, dómpróstur, Ingrid Hansen, námsfrøðingur, Jens Beck, trúboðari. Jógvan, Olga og Sirikit syngja.
Høvið verður at seta spurningar og gera viðmerkingar

**18.00 Nátturi** (tekning ikki neyðug)

**19.30 Blákross kvøldseta**
Jógvan Fríðriksson, biskupur, hugleiðir um spurningin: Hvar er bróðir tín?
Sangur: Mannskórið í Fuglafirði
Frásøgn frá arbeiðinum hjá Bláa Krossi í India v/Shekhar Singh, aðalskrivara í Bláa Krossi India
Innsavnan til Blákrossarbeiðið

**22.00 Ungdómstiltak – BKU skipar fyri**

**Sunnudagur 18. apríl:**

**12.00 Altargangsgudstænasta í Sjóvar kirkju**
v/Sverra Steinhólm, formanni í Bláa Krossi Føroya

**15.00 Familjutiltak í bygdahúsinum**

**18.00 Blákrossmøti**
Sólrun Poulsen, Tórshavn, talar um evnið: Teir komu berandi við einum manni (Luk. 5, 17-25)
Sangur: Gospel Kids
Stutt frágreiðing um arbeiðið hjá Bláa Krossi
**Nátturi (tekning ikki neyðug)**

**Um landsstevnuna**
Øll tiltøkini eru almenn, tó skal viðmerkjast, at bert blákrosslimir hava atkvøðurætt á aðalfundinum leygardagin kl. 14.00.

**Stað:** Øll tiltøkini verða hildin í Bygdarhúsinum á Strondum

**Máltíðir:** Tann, ið ynskir døgurða leygardagin, má tekna seg frammanundan á skrivstovu felagsins tlf. 470 700 ***í seinasta lagi mikudagin 14. apríl 2009.*** Annars er ikki neyðugt at boða frá luttøku.

**Prísur fyri mat:** Døgurði 80 kr. Børn undir 14 ár hálvan prís. Nátturi og drekkamuður er ókeypis og er ikki neyðugt at tekna seg til hesi.

Bláí Krossur Føroya · Heiðavegur 32 · 660 Saltangará · telefon 470 700
fax 470 701 · t-postur: blakross@blakross.fo · heimasíða: www.blakross.fo